# Grindahvalur





Stødd: Grindahvalur verður í mesta lagi 6,5 metrar langur. Hannarnir blíva 1 m longri enn honirnar.

Føði: Grindahvali dámar best høgguslokk, men hann er akkurát sum vit menniskju. Fær hann ikki tað besta, so tekur hann tað næstbesta, og tað er m.a. svartkjaftur, gulllaksur og makrelur.

Hvølpar: Honirnar ganga við hvølpinum í uml. 12 mánaðir. Hvølpurin kemur út við sveivinum fyrst. Honirnar fáa ein hvølp 4. - 5. hvørt ár. Í miðal fáa tær 3 - 4 hvølpar alt lívið. Hvølparnir súgva mjólk frá mammuni í 1½ - 3½ ár, men byrja at eta fasta føði frá tí teir eru ½ ár.

Sendir serligt ljóð: Hvalur kunnar seg við eini sonarskipan. Ein kann siga, at hann sær við oyrunum. Hann sendir ljóðbylgjur út gjøgnum seiga spikið í kúluni, sum er ljóðstyrkjandi. Rakar ljóðbylgan ein stima av fiski, kastar stimin ljóðið aftur til hvalin, sum á tann hátt kann "síggja", hvat slag av fiski, talan er um, hvussu nógvur fiskur er í stimanum, og hvar stimin er.

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE